# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## 3. november spennandi dagur

Tað eru fleiri áhugaverdir og týdningarmiklir dagar í november í ár. 4. november er forsetaval í USA. 11. november eru val til bý- og bygdaráð kring landið. Og enn ein sermerktur dagur í november er nú mánadagin 3. november. Henda dag skulu umsóknir til oljuleiting á føroyska landgrunninum verða inni hjá Jarðfeingi. Lítið hevur verið at frætta um áhugan. Sjálvandi fara stóru oljufeløgini, sum ætla at søkja, ikki at kunngera hetta í miðlunum, áðrenn tey lata myndugleikunum umsóknir. Og vanliga mannagongdin hevur verið, at feløgini møta hjá Jarðfeingi tann dagin freistin gongur út, og tað er á middegi nú mánadagin. So vit kunnu bara vóna, at kallendarin hjá Jarðfeingi mánadagin fyrrapart er fullur.

Hinvegin hava vit neyvan orsøk til at halda, at tað er stórur gravgangur eftir at taka lut í eini nýggjari útbjóðing. Hetta av fleiri orsøkum. Ein er tann, at fleiri av oljufeløgunum fingu loyvi í 2. útbjóðing, og hetta eru loyvi, sum tey sjálvandi fyrst vilja troyta, áðrenn tey vilja binda seg til enn fleiri uppgávur. Ein onnur orsøk kann vera tann, at feløgini hava havt og hava úr at gera at søkja um leitiloyvi í bæði bretskum og norskum øki. Um verandi heimskreppa eisini kann hava minkað um áhugan at søkja her skulu vit ikki siga, tí oljufeløg eru nokk tær fyritøkur, sum eru frægast fyri fíggjarliga og ein fortreytin fyri at tey kunnu halda fram við at virka eru nýggjar íløgur í leiting. Fyri hvønn dropa av olju tey taka upp úr undirgrundini skulu tey finna nýggjar. Um lækkandi oljuprísurin eisini kann minka um áhugan er ringt at siga. Tað var tann tíð, tá prísurin fall niður á 10 dollarar fyri tunnina og minni, og tá fór man at tosa um, at leiting um okkara leiðir við harvið fylgjandi útbygging fór ikki at løna seg.

Men tað eru so eisini orsøkir til, at oljufeløgini framvegis síggja eina framtíð í okkara undirgrund. Tað er jú staðfest, at ein virkin kolvetnisskipan er í undirgrundini, og hetta er eitt týðandi trekkplástur. Tað verður eisini hildið, at júst undirgrundin um okkara leiðir er ein tann seinasta møguliga oljuleið, har tú enn kann gera stór fund. Og síðani dregur tað eisini feløg henda vegin, at tað eru gjørd stór oljufund beint hinumegin markið, Rosebank og Cambo. Eisini avgerðin hjá Total at byggja út fyrsta gassfeltið vestan fyri Hetland kann vera medvirkandi til, at oljufeløg, ið eru virkin í bretskum øki, eisini síggja føroyska økið sum ein heilt náttúrligan part í eini framtíðar leiti- og útbyggingarstrategi.

So her er nakað, ið talar fyri og ímóti áhuga at vera við í eini nýggjari útbjóðing. Vónandi verða onkur av stóru oljufeløgunum við, eitt nú StatoilHydro, Dong og Chevron, sum vit vita arbeiða við eini strategi, ið fevnir um leitiøki báðumegin markið. Hvussu verður við BP, Shell oø. er ilt at meta um. Eru tey ikki við, hava tey tó altíð møguleika at farma inn hjá øðrum.

**Sosialurin**

## Ein felags rødd úr Suðuroynni

**KRISTIAN HOLBÆK**
Felagslistin á Tvøroyri



Størsta og týdningarmesta avbjóðingin fyri komandi býráð er at fara undir tilgongdina til kommunusamanlegging í Suðuroynni. Og tað hevur alstóran týdning, at persónarnir í nýggja býráðnum hava rætta hugburðin og neyðugu diplomatisku evnini, um samanleggingin skal gerast ein succes. Tí bert ein stór kommuna megnar at lyfta uppgávuna at bjóða vinnulívinum neyðugu karmarnar fyri at skapa menning, og harvið skapa nýggj arbeiðspláss. Nýggj arbeiðspláss, fíggjarligur vøkstur og størri skattainntøkur er treytin fyri at Suðuroyggin kann mennast og blíva eitt betri stað at búgva. – Bara ein felags rødd hevur politisku tyngdina til at ávirka landsins mynduleikar. Nýggju arbeiðsplássini skulu serliga eftirlýsa vælútbúgvin ung fólk, so Suðuroyggin aftur fær lívsmegi og gerst meira moderna, við mentanar-, skúla-, frítíðar- og øðrum tilboðum, sum modernaðir ungir føroyingar krevja fyri at trívast.

Um vit bara halda fram sum nú, kunnu vit sjálvboðin byrja at avmontera Suðuroynna, og tá er bara ein spurningur um tíð, til fólkatalið veruliga minkar og vinnulívsgrundarlagið hvørvur. Ella vit kunnu royna, konstruktivt og við opnum sinni – so skilagott sum gjørligt – við hjálp frá fakliga kompetentum føroyingum og útlendingum, at fara undir eina felags proces í bjartskygni og demokratiskum anda, sum vónandi kann gera døkku framtíðarútlitini til skammar. Tað skulu vit gera, hóast ongin av okkum kennur svarini, og øll standa óviss og tøvandi framman fyri uppgávuni – og viðganga, at fyrsta altavgerandi stigið er samanlegging í eina kommunu.

## Skommin hjá Tórshavnar Kommunu

**KARLOT HERGEIRSSON**



Nú hava tey eldru og óhjálpnu bíðað nóg leingi. Tað kann ikki vera meiningin, at vit ikki hava eldrabýli nokk. Tey sum hava tænt sína vernaplikt fyri samfelagið og kommununa. Tey sum hava strevast og stríðst, skapt henda vælstand, sum vit hava í dag. Tað standa í løtuni 375 á bíðilista og tað talið økist bara. Sitandi meiriluti ætlar at bíða til 2011 til at gera nakað, tá vera nokk fleir av teimum farin her frá. Her skal ikki bíðast. Her skal handlast.

Fyri tveimum valskeiðum síðani var tað heilt stóra evni, at vit skuldu hava ansingar pláss til børnini. Tað kláraði undanfarna býráðssamgonga ímillum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin. Vit opnaðu 15 stovnar til børn, tað er næstan ein um ársfjóringin, øll 4 árini. Eitt satt bragd.

Suðurstreymur er tað økiði í landinum har tað er størst tørvur á ellis, røktar og umlætingarplássum. Okkara kommuna sum hevur tær størstu skattainntøkurnar í landinum, hevur tann størsta tørvin á plássum, tað er stór og fúl skomm. Eldraøkið er ein landsuppgáva, men vit kunnu ikki bíða, tað kann ikki vera meiningin at tey eldru skullu verða offrini.

Vit skullu hava pláss fyri børnunum. Vit skullu hava pláss fyri teimum eldru. Læt okkum koma skommini til lívs. Vel Fólkaflokkin sum syrgdi fyri at børnini hava ansing. Gev mær tína stemmu so skal eg syrgja fyri at tey eldru eisini blíva ansaði.

X við pláss fyri teimum eldru.

X við Lista A.

X við Karlot Hergeirsson

## Ungdómur og eftirskúlar

**ELLA SLOAN MÜLLER**
X Fólkafloksins



Eftir lokna skúlagongd, t. v.s. eftir 9 og 10 flokk, er ein vaksandi áhugi hjá okkara ungu at fara uttanlanda á eftirskúla ella at arbeiða í fremmandum umhvørvi. Eftir langa skúlagongd, hava tey ungu tørv á, at fara heimanífrá, at nema sær kunnleika, at uppliva nakað annað.

Tey mennast av at koma heimanífrá, soleiðis at tey eru betri fyri, at takað ímóti teimum avbóðingum, ið okkara miðnámsskúlar geva teimum. Tíanverri, hava fleiri av okkara ungdómi ikki pening, ella møguleika, at spara pening upp, fyri at fara uttanlanda.

Tórshavnar Kommuna hevur samskifti við kommunir / býir, í øðrum norðanlondum, og hevði tað verði ein góður møguleiki, at gjørt sínamillum avtalur um at hjálpa teimu ungu við tilboðum uppá eftirskúlar, ungdómsarbeiði o. a., eisini á tí fíggjarliga økinum.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialu

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.